# Uppgerð við etisku virðini

**Leirvíkingurin og valevni Reimund Langgaard er greitt ímóti fosturtøku, men hann er ikki so fýrakantaður, tá tað viðvíkur samkyntum**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Reimund Langgaard leggur stóran dent á kristnu virðini, men hann heldur ikki, at tað er nakar vansi, at flokkur hansara ikki hevur nakra felagsstøðu móti fosturtøku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað hevur kanska serliga verið Miðflokkurin, sum hevur verið kendur fyri at seta fokus á etiskar spurningar í Føroyum. Men eisini øðrum flokkum verður dentur lagdur á etisk ella kanska átrúnaðarlig virði.

Ikki minst í Sambandsflokkinum. Ein teirra, sum rópar harðast um etisk virði, er ungi leirvíkingurin Reimund Langgaard.

Hann er íðin heimamissiónsmaður og leggur stóran dent á kristnu virðini. Eitt tað fremsta í huganum hjá Reimundi er fosturtøka, og har hevur Reimund eina greiða støðu.

– Eg eri púra greitt ímóti fosturtøku. Eg síggi fostrið sum eitt menniskja. Hetta geri eg bæði útfrá bíbilskum- og læknafrøðiligum sjónarmiðum. Tá tú kemur til ta niðurstøðu, at talan er um eitt menniskja, so er greitt, at tú ert ímóti – tí dráp móti menniskjum kann ongantíð góðtakast, sigur Reimund Langgaard.

Í einari møguligari lóggávubroyting á fosturtøkuøkinum metir Reimund, at møguligt hevði í mesta lagi verið at koma til eina semju, sum bannaði fosturtøku við teimum undantøkum, at talan var um neyðtøku og lív móti lívi.

Viðvíkjandi samkyndum er Reimund ikki so avgjørdur. Men hann ger greitt, at hann er ímóti, at hesi skulu kunna giftast í kirkjuni.

– Eg eri ímóti skrásettum parlagi, og eg haldi, at tað ikki er pláss fyri samkyntum giftarmálum í kirkjuni. Men eg havi ikki so fýrakantaðar meiningar um borgarligt giftarmál og skrásetingar av samkyntum, sigur Reimund Langgaard.

Reimund heldur, at bíblian er hornasteinurin í okkara mentan og samfelag, men neyðugt er ikki at nýta hana sum undanførslu í politikki og í neyðstøðum – men sum grundarlagnum undir kristnu mentanini og virðunum í einum kristnum samfelag.

Samlað um samkynt og fosturtøku, sigur Reimund:

– Eg haldi spurningin um samkynt og skrásett parlag vera ein nógv minni trupulleika enn fosturtøkumálið, sigur Reimund.

Flokkar siga ferð eftir ferð, at tað skal vera upp til tann einstaka at taka støðu í teimum etisku málunum. Er hetta nóg gott? Eiga flokkar ikki at melda ein greiðan politikk?

– Skuldu allir flokkar havt eina tílíka greiða útmelding, so vildu vit í Føroyum havt dupult so nógvar flokkar sum nú, sigur Reimund Langgaard, sum við hesum sipar til, at tað hevði verið ein sambandssinnaður borgarligur flokkur móti eitt nú fosturtøka og so ein móti fosturtøka og líkaso við hinum pørtunum av føroyskum politikki.

Í øllum førum veit Reimund, at hann hevði ikki stillað upp fyri Sambandsflokkin, um hesin flokkur tók eina støðu, sum ikki samsvaraði við hansara etisku sjónarmið.

– Eg ivist ikki í, at nógv síggja meg sum ein fanatikara, men eg vil heldur vera reellur og fjali ikki útyvir míni sjónarmið, sigur Reimund Langgaard.

## Blokkurin burtur

Reimund Langgaard sigur annars um orsøkirnar til at stilla upp, at hann heldur, at hann stendur fyri nøkrum málum og virðum, sum hann heldur eiga at koma fram. Hann er uppstillaður í Eysturoynni, sum er ein av háborgunum hjá Sambandsflokkinum. Bæði við hinar flokkarnar og ikki minst innanflokka er kappingin hørð, men Reimund sigur seg leggja størstan dentin á at fáa sín boðskap fram og vísa á nøkur virði, sum hann heldur hava týdning.

Reimund kann eisini flokkast í tann bólkin av sambandsfólki, sum halda at blokkstuðulin úr Danmark við tíðini skal fella heilt burtur.

– Blokkurin skal kortini ikki minkast hetta næsta valskeiðið. Vit eiga nú at raðfesta familjuna og tey veiku í samfelagnum, sigur Reimund Langgaard.

Hann talar greitt ímóti loysingini. Stendur tað til hann skulu Føroyar ongantíð loysa frá Danmark og úr ríkisfelagsskapinum.

– Eg kenni meg sum føroying. Sum hann er nú, eri eg sera væl nøgdur við ríkisfelagsskapin. Haldi heldur, at vit skulu leggja dent á at skapa eitt og liviligt samfelag enn eina flaggstong í New York, sigur Reimund Langgaard.

Hann vísir aftur, at Sambandsflokkurin bert er ein mótpolur til verandi sjálvstýrisgongd. Hann heldur, at flokkurin hevur ein greiðan politikk á flest øllum økjum og er væl brynjaður til næstu árini sum møguligur partur av einari samgongu.

## Móti lokalpolitikki

À vinnuliga økinum er Reimund Langgaard fyri privatiseringum. Hann heldur pláss vera fyri nógvum einskiljingum hjá tí almenna.

– Eg ynski ein borgarligan politikk við sosialum atliti, sigur Reimund.

Men Reimund er ikki so glaður fyri tann lokalpolitikk, sum verður rikin í Føroyum í løtuni.

– Eg eri hart ímóti lokalpolitikki, sum hann hevur tikið seg út. Politikarar skulu vera fyri alt landið. Tað hevur kostað hesum landinum alt ov nógv, at politikarar bert berjast fyri egnum øki, sigur Reimund Langgaard.

Men tað merkir ikki, at Reimund eingi hugskot ella ætlanir hevur fyri framtíðina hjá Leirvíkini.

– Leirvík hevur ein trupulleika við, at vit hava so nógva ferðslu. Og tað líkist ongum, at støða ikki er tikin til, hvussu nógva ferðslan til og úr Norðoyartunnilinum skal skipast, sigur Reimund.

Hann heldur, at ein tunnil er besta loysnin fyri bygdina.

– Ein vegur oyðileggur nógv fyri bygdina. Ein tunnil er nógv tann besta loysnin fyri øll, sigur Reimund.

## Helst tveir flokkar

Í hesum døgum vísa veljarakanningar, at Sambandsflokkurin fær at fáa eitt megnarval. Ì Eysturoynni vónar Reimund, at teir kunnu fáa fatur á einum triðja tingmanni. Møguleikin er til staðar, um væl vil til. Og Reimund vil helst í samgongu við bert tveimum flokkum.

– Tað er nógv lættari at fremja verandi sparingar og minkingina av aðalráðum við bert tveimum flokkum í samgongu, sigur Reimund, sum vónar at síggja Javnaðarflokkin ella Fólkaflokkin í Tinganesi saman við Sambandsflokkinum.

## Stutt um...

Reimund Langgaard er 26 ára gamal. Hann býr í Leirvík, men hevur sína dagligu gongd í Havn, har hann gongur á Læraraskúla á síðsta ári og verður eftir ætlan liðugur í summar. Eisini tekst hann við ymiskt søluarbeiði. Hann er føddur og uppvaksin í Leirvík. Àðrenn Læraraskúlan gekk hann Handilsskúla og hevur eitt skifti burturi í øðrum londum. Hann hevur áður verið uppstillaður, men er enn ikki valdur á ting.

Eisini er hann íðin bridgespælari og leggur stóra orku í heimamissiónsarbeiði.

## Tunnil til Tjørnuvíkar

Ì greinini í greinarøðini við valevnum tosaðu vit við Eddie Joensen úr Kollafirði, sum stillar upp fyri Javnaðarflokkin. Í brotinum um Norðstreymoy heldur hann tað ikki koma nóg væl fram, at hann er greitt fyri einum tunli til Tjørnuvíkar - og aðrir tunlar í Norðstreymoy eru ein framtíðardreymur. So skuldi tað verið komið upp á pláss.



**VALGREINAR**

# Hví sleit Fólkaflokkurin samgonguna?

**Viðmerking til Jógvan við Keldu**

**Hanus Hansen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum*



Jógvan við Keldu hevur eina hálva síðu í Norðlýsinum 9.1.04, har hann staðfestir, at Tjóveldisflokkurin hevur slitið samgonguna.

Hvussu hann kann koma fram til hetta er púra óskiljandi fyri mær, men eg má samstundis ásanna, at eg ofta havi trupult at skilja hugsunarháttin hjá fólkaflokkinum.

Hann fer, sum fólkafloksmonnum líkt, eftir manninum og ikki eftir bóltinum. Orsøkin til samgonguslitið er, eftir hansara meining, ódugnaskapur hjá ávísum óroyndum tjóðveldispolitikkarum. Aftrat hesum kemur so ein svada um, at Tjóðveldisflokkurin ikki torir at standa við rórið í ringum tíðum. Hetta hevur hann sjálvandi loyvi at halda, men ikki at nevna tað, sum var beinleiðis orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin sá seg noyddan at geva formanni fólkafloksins eitt ultimatum, er eftir mínum tykki, at brongla veruleikan. Man kann sjálvandi tolka hetta á ymsan hátt, men yvirhøvur ikki at nevna leiklutin hjá løgmanni í hesum høpi, er ábyrgdarleyst.

Mær vitandi, so var tað Løgmaður, sum segði samgonguna upp við at koyra allar landsstýrismenninar fyri Tjóðveldisflokkin til hús. Orsøkin til hetta dramatiska stigið hjá okkara hægsta manni var fyrrnevnda ultimatum frá Tjóveldisflokkinum. Hesin var vorðin ein meinbogi í Landsstýrissamgonguni vegna illgruna um eina kriminella fortíð. Talan var um eitt gamalt mál, sum var drigið fram aftur í bókini hjá Grækaris Magnusson og Øssur Winthereigh " Skjót journalistin".

Hóast, at málið er gamalt, so hevur tað ongantíð verið lýst út í æsir alment, men heldur krógvað burtur. Flestu fólk hava uttan iva hildið sum so, at øll gera vit okkurt býtt við hvørt og í 80-unum var nógv stolið frá øllum møguligum uttan, at nakar var drigin til svars. Hví so gera so nógv hóvasták burtur úr einum Viðingi, sum í einari veikari løtu hevði stolið eina lítla millión frá einum flakavirki.

Men í nevndu bók kemur fram, at talan er um væltilrættalagt brotsverk, sum hevur gingið fyri seg í 4 - 5 ár. Eg má siga, at eg var rættiliga skelkaður, tá eg las bókina. Einki av tí, sum stendur í bókini, er enn afturvíst og verður tað neyvan.

At løgmaður var vorðin ein álvarslig hóttan fyri samgonguna er uttan fyri allan iva. Og man skal vera ógvuliga forstokkaður, um man vil vera við, at so var ikki.

Hevði Tjóðveldisflokkurin latið staðið til, so vóru hinir flokkarnir á Tingi klárir við eini misálitisváttan. Tað er hóast alt eitt mark fyri, hvussu langt man kann fara fyri eina góða søk.

Men, men. Ístaðin fyri, at taka fulla ábyrgd og fara úr Landstýrinum og lata onkran annan koma til, so gongur okkara hægsti maður berserkargongd úti í Tinganesi. Blakar heiðurligar landsstýrismenn út og krevur bæði lykil og fartelefon frá teimum upp á staðið. Sum um hann átti Tinganes. Síðani hevur hann stýrt landinum sum ein annar einaveldsharri.

Omaná tað heila, so hevur hann tann frekleika, at siga í nýggjársrøðuni, at hann hevur tikið fulla ábyrgd av sínum gerðum. Òfatiligt, at hetta skal koma fyri í einum demokratiskum landsparti.

Nei, Jógvan við Keldu. Lat vera við at geva Høgna Hoydal og Kristinu Háfoss skyldina fyri, at Sjálvstýrissamgongan reyk. Eg haldi, at fólkaflokkurin skal taka í egnan barm og syrgja fyri at rudda upp í flokkinum, so farast kann aftur til arbeiðis. Tað er syrgiligt, at samgongan skuldi fara so illa. Men tað er neyðugt, at hava nøkunlunda heiðurlig fólk í landsins leiðslu, um vit skulu fáa virðing millum manna, bæði í Føroyum, men so sanniliga eisini frá umheiminum.

Eg ivist ikki í, at flestu fólkafloksmenn - og kvinnur eru heiðurlig fólk og eg vóni tí, at fólkaflokkurin tekur hetta mál í álvara so tað aftur verður møguligt at savna allar sjálvsstýrissinnaðar føroyingar soleiðis, at Fullveldiskósin kann halda áfram.

Við hesum vil eg ynskja øllum fullveldissinnaðum landsmonnum eitt gott val.

# Breiðar semjur grundaðar á fólksins undirtøku

**Helena Dam á Neystabø**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Tað er ikki nóg mikið at seta sær stór mál. Stór og týðandi mál mugu grundast á breiðar semjur millum flokkarnar og ikki minst á fólksins undirtøku.

Vil man hin vegin røkka málinum, ella í minsta lagi nærkast málinum, so er neyðugt at vísa ein veruligan vilja til at finna eina breiða semju, sum røkkur inn í framtíðina. Ein lítil meiriluti er ikki nokk, tí aðrenn tú veist av, er ein lítil meiriluti blivin til ein stóran minniluta. Og soleiðis verða føroyingar blakaðir úr einu borði í annað, valskeið aftaná valskeið, um tað ikki hesaferð eydnast at grunda politikkin á eina breiða politiska semju.

Og tað átti ikki at verið ringt. Allir flokkar hava sagt, at Føroyar skulu gerast sjálvbjargnar búskaparliga og fyrisitingarliga, og teir flestu flokkar hava eisini sagt, at tann rætti vegurin er at fremja skilagóðar yvirtøkur. Allir hava sagt, at vælferðin hevur fyrsta prioritet. Javnaðarflokkurin hevur sagt, at sjálvsavgerðarrættur Føroya er sjálvsagdur og ómissandi, og tað hava teir flestu av hinum flokkunum eisini sagt, og at vit eiga at virka fyri at Føroyar og Danmark verða tvey javnsett lond.

Tann, sum ikki er partur av føroyskum politikki má tí undrast stórliga, skriða sær í nakkanum og spyrja, hvat er tað so vit klandrast um? Hví fara vit ikki bara til verka, tí har er arbeiði niðurfyri til í minsta lagi eitt ella tvey valskeið, áðrenn komið verður teir spurningar sum veruliga skilja partarnar.

Og rætt er tað. Her eru so nógvar uppgávur, sum skulu fáast frá hondini, áðrenn tann dagurin kemur, at støða skal takast til fullveldisspurningin. Men vit hava brúkt óneyðuga nógva orku uppá at klandrast um henda spurning, og tann sum lurtar eftir valsríðnum hoyrir beinan vegin, at bæði sambandsflokkurin og tjóðveldisflokkurin trívast væl í hesari polariserin, tí tá kunnu teir vera vísir í, at einki hendir.

Vit hava snøgt sagt hvørki ráð ella tíð til allar hesar ósemjur longur. Og tí er neyðugt at javnaðarflokkurin kemur at standa á odda fyri einari komandi samgongu, ið vil semjur heldur enn endaleysar ósemjur.

# Barnafamiljur byggja land

**Kunnu betra um korini hjá barnafamiljum í Føroyum, betra vit um viðurskiftini hjá øllum samfelagnum. Prísurin á mjólk skal lækkast, syskina avsláttur skal gevast í barnagørðum og dagrøkt og tað skal bera til at fáa tak yvir høvdið.**



**John Johannessen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*

Her má vend koma í. Tað ber ikki til, at vit halda fram at niðurpína familjuna við avgjøldum, sum undanfarna samgonga hevur gjørt tey seinastu seks árini.

Familjur við fleiri børnum mugu fáa ein lættari fíggjarligan gerandisdag. Hjá familjum við vanligari verkamanna inntøku, er tað nærum ómøguligt at fáa pengarnar at røkka.

Hevur tú eina inntøku, sum er 8 til 9 túsund krónur eftir aftaná skatt, er tað sjálvsagt, at tað ber ikki til at gjalda einar fýra túsund um mánaðin fyri barnaansing og sjey túsund fyri tak yvir høvdið.

**Vit fáa skil á**

Tí hevur Javnaðarflokkurin sum mál at geva ein serligan syskinaavsláttur, soleiðis at familjurnar ikki verða fíggjarliga útpíndar.

Samgongan vildi spara nakrar fáar krónur á fíggjarlógini. Tær tók hon millum annað burtur av stuðulinum til mjólk, soleiðis at mjólkin bleiv nógv dýrari hjá barnafamiljum at keypa.

Javnaðarflokkurin ætlar sær at stríðast fyri at lækka prísin á mjólk. Tað kostar ikki landinum meira enn tríggjar milliónir krónur at fáa mjólkina munandi bíligari. Vit vilja hjálpa barnafamiljunum. Fáa tit fíggjarliga góð kor, er hetta grundarlag undir tryggum og væl virkandi heimum. Heimum, sum kunnu ala upp eitt komandi ættarlið, ið vit kunnu gleðast um og vera errin av.

**Gott at eiga børn**

Tað er gott fyri eitt framkomið samfelag, at nógv børn verða fødd. Í Føroyum føðir hvør kvinna í miðal 2,5 børn. Hetta talið kalla vit burðartíttleika.

Fyri at fólkatalið kann vera í javnvág, er neyðugt við einum burðartítt-leika, sum er oman fyri tvey børn fyri hvørja kvinnu.

Men tað eru bara heilt fá lond í vesturheiminum, ið uppfylla hesar treytir. Í Danmark er talið 1,7 og í til dømis Norðuritalia, er talið bara 1,0.

Hetta hevur fingið hesi londini at ræðast eina eldrabylgju. At tað vera fleiri gomul fólk enn ung, og at nógvur peningur skal brúkast til sjúkrarøkt, pensjónir og ellisheim, meðan fá fólk eru til at gjalda skatt.

Hesum verða vit spard fyri í Føroyum, um vit syrgja fyri, at barnafamiljurnar hava tað gott. Vit skulu syrgja fyri, at ung í Føroyum tora at eiga børn. Tá skapa vit eitt sunt samfelag. Einar sunnar Føroyar fyri øll.

**Politikkur við innihaldi**

Javnaðarflokkurin hevur fleiri ferðir í valstríðnum víst á, hvussu vit við at lætta um hjá barnafamiljunum, tryggja, at vit her í landinum varðveita ungdómin. Og at vit framhaldandi hava sunna lutfallið millum ung og gomul.

Javnaðarflokkurin er einasti flokkur, ið samskipar sosialpolitikkin og samfelagspolitikkin.

Og hevur Øssur hug at spyrja, hvussu tað skal fíggjast? Svarið er einfalt. Hetta er í grundini einasti máti at skapa eitt samfelag, sum hevur lutfalsliga nóg nógv fólk í vinnuførum aldri.

Við tykkara hjálp tann 20. januar, kunnu vit byggja húsið, sum vit kalla Føroyar fyri øll.